# Faroexpo: EIN sáttmáli kann fáa stóran týdning

**- Hetta er eitt nýtt konsept í Føroyum, men sum er vælkent í grannalondum okkara. Men tað er eingin ivi um, at hetta kemur at verða til gagns fyri føroyskt vinnulív, sigur samskiparin av Faroexpo, Símun Hammer**

FAROEXPO
*Snorri Brend*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Saltangará: – Faroexpo er ikki at meta sum ein vanlig sølustevna. Hetta er ein ráðstevna, har fólk hittast við tí fyri eyga at tosa um samstarv í framtíðini.

– Á henda hátt hava fyritøkurnar møguleika at kunna víðka um virksemið sítt og at økja um samstarvið við fyritøkur í øðrum londum, sigur Símun Hammer.

Hetta er fyrsta ráðstevnan av sínum slagi í Føroyum, men miðað verður eftir at henda stevnan verður endurtikin tvey tey komandi árini í øllum førum.

– Verða úrslitini nøktandi, so vóna vit, at henda ráðstevnan er komin fyri at vera, sigur hann.

Á ráðstevnuni í næstu viku verða íalt 40 fyritøkur, harav føroyingar eiga 20 teirra. Fokus verður hesaferð sett á oljuvinnuna og annað virksemi í tí sambandinum.

## Samstarv báðar vegir

Símun Hammer er sum vera man spentur uppá úrslitið av hesi ráðstevnuni í Runavík. Og hann ivast heldur ikki í, at tær ymisku fyritøkurnar eisini eru tað.

Nógvar av føroysku fyritøkunum eru ikki so stórar, um sammett verður við tær útlendsku. Hetta kann vera ein vansi, men kann eisini verða ein fyrimunur.

– Fær ein føroysk fyritøka ein sáttmála um eina av sínum framleiðslum, so kann tað merkja sera nógv fyri hesa í framtíðini. Tað skal nevniliga ikki nógv til, fyri at tað kann gerast til nógv.

– Tí er eisini rættari hjá teimum føroysku fyritøkunum at satsa smalt, heldur enn breitt, sigur Símun.

Hann væntar tí ikki, at talan bara verður um einvegis úrslit. Tær føroysku fyritøkurnar kunnu á ráðstevnuni vísa fram sínar tænastur og soleiðis finna fram til útlendskar fyritøkur, sum eru viðkomandi fyri tær.

– Her er talan um samstarv báðar vegir, sigur Símun Hammer.




*Símun Hammer samskipar tann vinnuliga partin, meðan Rannvá Troest hevur ábyrgdina av tí mentanarliga partinum av Faroexpo 05*

# Vinnan og mentan hond í hond

**- Vit hava lagt eina fjølbroytta skrá fyri alla næstu viku. Og tí vóna vit, at fólk í hópatali fara til hesi tiltøkini, sigur Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu**

FAROEXPO
*Snorri Brend*

**Runavík:** Tað verður sum á ólavsøku í Runavík hesa komandi vikuna.

Tvey rættiliga stór og umfatandi tiltøk fara at bakkastokki um somu tíð - Faroexpo 05 og Mentanarvikan.

Frammanundan hava nógvir fundir verið hildnir og nógv er stungið út í kortið. Nú eru so báðar skráirnar lidnar. Og tað er ikki at taka seg aftur í, at her er nakað fyri øll.

Sjálv vinnuráðstevnan er ikki opin fyri almenningin-um, men almenningurin fær kortini ein smakk av hesi ráðstevnuni við teim almennu fyrilestrunum, sum eru á skránni.

Hinvegin so fær tann stóra fjøldin møguleika at luttaka við okkurt av teimum mongu mentanartiltøkunum, sum byrja í kvøld og sum halda fram alla næstu viku.

- Her er nakað fyri øll. Og tí vóna vit, at maður fer av húsi til øll hesi spennandi tiltøkini, sigur Rodmundur Nielsen.



*- Ein gamal tanki um samstarv millum vinnuna og mentanina er nú vorðin veruleiki, sigur Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu*

## Gamal tanki

At ráðstevnan og mentanarvikan eru lagdar júst í komandi viku er ikki uttan orsøk.

Tá ein hugsar um tað mentanarliga virksemið, so er henda tíðin at meta sum ein meiri rólig tíð.

Nógv virksemið er í gongd innan mentanina um summarið og eisini tá tað fer at nærkast jólum. Men um heystið er hetta mundandi minni.

Við teirri áhugaverdu skránni á hesi mentanarvikuni verður gjørligt hjá fólki at fara til eina rúgvu av tiltøkum á mongum ymiskum støðum í Runavík og har á leið.

Og alt hetta fer fram, samstundis sum kommunan er karmur um Faroexpo – ta fyrstu ráðstevnuna av slíkum slagi.

- Hetta er ein gamal tanki, um at fáa vinnuna og mentanina at samstarva. Og tí vóna vit, at fólk fara at taka væl undir við hesum samstarvinum og øllum teimum tiltøkum, sum verða teir komandi dagarnar, sigur borgarstjórin.

Gongst sum hann og fyrireikararnir ætla og vóna, so verður tað ikki seinastu ferð at Faroexpo verður í Runavík.

Hetta er í øllum førum eitt gylt høvi at víðka um sjónarringin – bæði vinnuliga og mentanarliga!